# Selur blóðgimaskinur til Noregs

**Vestmenningur hevur gjørt eina blóðgimaskinu, sum verjir umhvørvið munandi. Norðmenn hava higartil keypt tríggjar maskinur at brúka í alivinnuni, og teir láta heilt væl at**

FRAMTØK
*Edvard Joensen*



Rógvi Nielsen, smiðjumeistari í Vestmanna, hevur ment eina nýggja blóðgimaskinu, sum brúkt verður til alifisk. Norðmenn hava higartil keypt tríggjar maskinur, og teir láta heilt væl at royndunum, sigur uppfinnarin.

Maskinan er einfald í síni uppbygging. Men tað kolveltandi við henni er, at hon brúkar ikki vatn til at lata fiskin bløða í. Hann bløðir á turrum. Soleiðis verður umhvørvið spart fyri alt tað klorið, ið annars varð latið út í vatnið, ið brúkt varð at bløða í. Og tað var ikki smávegis, sigur Rógvi Nielsen.

Maskinan arbeiðir soleiðis, at fiskurin verður køldur niður í kørum, áðrenn hann kemur til sjálva blóðgingina. Fiskurin gerst eisini róligari, tá hann kølnar. Tá fiskurin kølnar, setir blóðið at hjartanum, sum situr frammi við táknurnar.

Síðan verður hann koyrdur í sjálva maskinuna, har tveir knívar verða stungnir undir kápuna, so hann bløðir. Eisini fær hann eitt slag í høvdið, so hann dovnar heilt. At enda verður hann settur eftir høvdinum í eitt kar, har hann so stendur og bløðir út á turrum. Blóðið verður savnað í kør og skal ikki veitast burtur gjøgnum vanlig frárensl, men savnast og burturbeinast aðrar vegir.

Hetta, at lata fiskin turrbløða, hevur fleiri fyrimunir, vísir Rógvi Nielsen á. Í fyrsta umfari tekur tað bara einar fimm minuttir hjá fiskinum at bløða út. Tá hann bløddi í vatni, vardi tað umleið eini trý korter ella so, sigur hann. Umframt skuldi so alt vatnið, ið brúkt varð, skiftast út regluliga.

Rógvi Nielsen, sum í 13 ár var tekniskur leiðari á Vestsalmon, greiðir frá, at har var talan um at skifta umleið fimm til átta tons av blóðvatnið um tíman. Í blóðinum situr møgulig smitta, fiskurin hevur. Eitt nú ILA. Hetta skal so eisini sóttreinsast við klori. Og bara á virkinum, har Rógvi Nielsen arbeiddi, vórðu eini átta tons av klori um vikuna slept á sjógv saman við blóðvatninum.

– Tað sigur seg sjálvt, at um alt landið verður hetta til eina stóra nøgd. Hesum sleppa vit undan, nú blóðið ikki verður latið í vatn, men savnað aðrastðani, vísir Rógvi Nielsen á.

Tvær av blóðgimaskinunum, sum seldar eru til Noregs, hevur stóra alifyritøkan Pan Fish keypt, sigur Hógvi Nielsen. Tann triðja, sum sett varð upp í september, er seld einum øðrum felag.

Hann sigur frá leiðsluni hjá Pan Fish, at teir hava ongar klagur fingið um maskinurnar yvirhøvur, og at tær rigga avbera væl.

Pan Fish savnar, sum ætlanin eisini er við maskinuni, alt blóðið úr alifiskinum. Og nú arbeiða teir seriøst við ætlanunum um at gagnnýta hetta blóðið. Ætlanir eru um at byggja eit virki við síðuna av kryvjivirkinum, har blóðið skal viðgerast og nýtast í parfumuídnaðinum, sigur Rógvi Nielsen.

Enn er eingin maskina seld í Føroyum, sigur hann. Grundin man vera tann trupla støðan, alivinnan her heima er í í løtuni, verður mett.

Men nú verður farið ein rundtúr til føroysku kryvjivirkini at at gera eitt søluátak, sigur Rógvi Nielsen.

Hann sigur, at nýggja blóðgimaskinan kostar umleið 700.000,- krónur, tá hon er klár at seta í gongd.



*Rógvi Nielsen hevur ment eina nýggja blóðgimaskinu, sums serliga alivinnan kann nýta. Tríggjar maskinur eru seldar til Noregs, har tær verða nýttar við góðum úrsliti. Men enn hevur einki føroyskt virki fingið hana*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Stórt tiltak á flogvøllinum

**Kunningarstovan í Vágum skipar saman við handlum og fyritøkum í oynni fyri stórum tiltaki í høllini á flogvøllinum í kvøld**

HUGNALØTA
*Edvard Joensen*



*Felagið Vágar, sum rekur Kunningarstovuna í Vágum, ið skipar fyri tiltakinum, hevur fingið nýtt búmerki. Tað myndar bókstavirnar FV og sýnir bæði oynna og Vágatunnilin í grønum og blám liti*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Stórt tiltak við mótasýning og øðrum undirhaldi verður í høllini í terminalinum á flogvøllinum í kvøld klokkan 18.30, sigur Kunningarstovan í Vágum í tíðindaskrivi.

Terji Nielsen, kunningarleiðari í Vágum, greiðir frá, at tiltakið byrjar við borðhaldi klokkan hálvgum sjey. Tað er cafeteria á flogvøllinum, sum stendur fyri borðhaldinum. Borðhaldið verður skipað sum buffet, sigur kunningarleiðarin.

Einir 10 handlar í Vágum verða við í tiltakinum. Umframt verður sjónleikur og spurnarkapping millum bygdarráðini í oynni. Eisini fer ein hárfríðkanarstova at sýna fram ymisk kynstur.

Bygdarráðini í Vágum fara at luttaka í spurnarkapping, sum verður skipað soleiðis, at tvey og tvey fyrst hittast í hálvfinalu, og so fara vinnararnir í finaluna. Gløggasta bygdarráðið í oynni fær so steyp frá Atlantsflogi.

Eisini fara sjónleikarar úr Vágum at sýna fram onkran stuttar leikir, sigur Kunningarstovan.

Tiltakið kostar 175,- krónur fyri hvønn, og atgongumerkini kunnu keypast á kunningarstovuni í Miðvági umframt í handlum í bygdunum í Vágum. Hilmar Jan Hansen fer at vera frásøgumaður undir tiltakinum á flogvøllinum í kvøld.



# Samgongan góðtekur ikki hall

**Íløgutørvurin í Føroyum er stórur sum ongantíð áður. 313 mio. eru settar av til íløgur komandi ár. Búskaparliga er einki til hindurs fyri, at landið hevur hall á fíggjarlógini, nú íløgutørvurin er so stórur, men Kristina Háfoss sigur, at eitt hall á fíggjarlógini gongur beint ímóti ynskinum hjá samgonguni um ein sjálvberandi búskap**

ÍLØGUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Landið hevur sett 313 milliónir av til íløgur komandi ár. Av teimum er nógv størsti parturi til nýggja suðuroyarskipið, sum eftir ætlan kostar 109 mio. krónur næsta ár.*
*Mynd: Savnsmynd*

Íløgutørvurin veksur bara. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 eru 313 mio. krónur settar av. Størsta íløgan hjá landinum verður nýggja suðuroyarskipið. Skipið kostar í alt 300 mio., og komandi ár verður síðsta gjaldið á 109 mio. krónur goldið.

Av øðrum íløgum kunnu nevnast 32 mio. krónur til bústovnar til sinnisveik og eldrabústaðir. Útbúgving og gransking fáa eisini høga raðfesting við 35 mio. krónum.

Seinastu árini er stórur partur av íløguútreiðslunum hjá landinum farin til nýggja suðuroyarskipið og nýggja Landssjúkrahúsið.

Í bóklinginum um fíggjarlógaruppskotið 2004 stendur, at tað verður ein munandi lætti hjá landinum í 2005, tá suðuroyarskipið ikki longur verður á íløguætlanini.

## Øking

Hyggur ein nærmari at íløgutørvinum hjá landinum farnu árini, sæst, at íløgurnar er støðugt øktar. Frá 2000 eru samlaðu íløgurnar hjá landinum hækkaðar við góðum 150 mio. krónum. Tað er einki dulsmál, at íløgurnar eru óvanliga stórar í løtuni. Suðuroyarskip og komandi Norðoyatunnil eru ikki vanligar íløgur, og tí er íløguætlanin hjá landinum væl størri enn undanfarin ár. Tá hesar stóru verkætlanir eru gjørdar og goldnar, kundi ein freistast at hugsa, at íløgutørvurin hjá landinum lækkar aftur nakað.

## Undirskot

Røddir hava verið frammi um, at hyggur ein at fíggjarætlanini við búskaparligum eygum, átti einki at verið til hindurs fyri, at landskassan, hesi árini við óvanliga stórum íløgum, hevur undirskot. Ein grundgeving er, at landsins fíggjarætlan als ikki kann sammetast við eina fíggjarætlan hjá einum privatum virki.

Tað er ikki av líka stórum týdningi, at eitt land hevur svørt tøl á botnlinjuni á hvørjum ári, sum hjá einum virki. Búskaparliga er tað ikki eitt ófrávíkiligt krav, at fíggjarætlanin hjá landinum skal geva yvirskot á hvørjum ári.

Búskapurin hjá einum landi eigur at miða eftir at hava eina ávísa javnvág yvir fleiri ár, so ikki ov stór sveiggj eru í búskapinum. Tað er ikki óvanligt, at eitt landið ger stórar íløgur, sum alt fyri eitt ikki kasta nógv av sær, men sum fráliður hava stórar inntøkur við sær. Ein kann tí freistast at spyrja um føroyski landskassin ikki hevur ráð til eitt lítið hall á fíggjarætlanini, nú íløgutørvurin komandi ár er óvanliga stórur.

Fleiri virkir kring landið hava ilskast á avgjøldini og nýtslu skattin, sum eftir ætlan verður álagdur teimum komandi ár. Virkini hava alment givið til kennar, at tey kenna seg sum skattakrevjarar fyri landið, sum nú hevur torførari við at fáa endarnar at røkka saman. Ein loysn kundi verið at havt undirskot á fíggjarlógini, so sluppu virkini undan nýggju avgjøldunum.



*Kristina Háfoss, limur í fíggjarnevndini, sigur, at reint búskaparliga ber væl til at hava hall á fíggjarlógini, tá íløgutørvurin er stórur, men politiska raðfestingin hjá samgonguni um ein sjálvberandi búskap býður hesum ímóti.*
*Mynd Savnsmynd*

## Politisk raðfesting

Kristina Háfoss er limur í fíggjarnevndin í løgtinginum. Hon tekur undir við, at reint búskaparliga er einki til hindurs fyri, at landskassin hevur undirskot av og á, bara ein ávís javnvág er millum inntøkur og útreiðslur yvir eitt longri áramál. Tjóðveldistingkvinnan leggur tó dent á, at í samgonguni er ein greið politisk raðfesting, at landskassin ikki skal hava hall á fíggjarlógini.

–Vit hava sum er ein ríkisstuðul á 615,5 mió. kr. inni á fíggjarlógini, og harvið í veruleikanum eitt undirskot á fíggjarlógini um hesin studningur ikki kom úr útlondum. Málið má verða at fáa ein sjálvberandi føroyskan búskap óheftan av studningi uttanlands, og harvið eina fíggjarlóg óhefta av ríkisstuðli.

Við okkara politisku raðfesting ber snøgt sagt ikki til, at vit vísa eina fíggjarætlan við undirskoti, har úrslitið verður, at vit mugu leggja eftir uppsparingini. Búskaparliga ber tað væl til, men, eg haldi, tað er skeivt longu nú at tosað verður um møguleika fyri at hava eina fíggjarætlan við halli, bara tí búskapurin er stagneraður nakað. Hevði verið talan um veruliga búskaparliga kreppustøðu hevði støðan verið ein onnur, greiðir Kristina Háfoss frá.

Hon vísir á, at tað alt ov tíðliga at tosa um ein kreppu í føroyska búskapinum. Føroyski búskapurin er sum heild væl fyri, hóast ávísir partar av vinnulívinum eru í kreppu. Limurin í fíggjarnevndini ásannar, at ferðin á búskapinum er nógv minkað. Hon greiðir frá, at øktu íløgurnar komandi árini eru gjørdar við tí fyri eyga at halda dampinum uppi.

- Sum fíggjarligt stýringsamboð eru íløgur lættari at stýra enn raksturin. Øktu íløgurnar fyri 2004 er eitt greitt tekin um, at vit royna at halda ferðina á búskapinum uppi, sigur Kristina Háfoss.

Landsstýrið hevur eisini ætlanir um at lækka skattin á arbeiði komandi ár, og hetta átak er eisini ein roynd at halda ferðini á føroyska búskapinum uppi.

## Minni rok

Undir fíggjarlógarviðgerðini í fjør vóru fleiri stríðsmál í fíggjarnevndini, bæði millum samgongu og andstøðu, og innanhýsis í samgonguni. Sambært Kristinu Háfoss verður støðan øðrvísi í ár, tí nevdin hevur verið við í fyrireikingarar-beiðinum.

Samgongulimirnir í fíggjarnevndini hava verið við í allari fyrireikingini til fíggjarlógaruppskotið fyri 2004. Hetta er ikki vanlig mannagongd, men tjóðveldiskvinnan heldur, at tað er skilagott, at løgtingið eisini er umboðað undir fyrireikingunum.

Spurd, um hvørji stríðsmálini verða í fíggjarnevndarviðgerðini í ár, svarar Kristina Háfoss, at tað er ilt at meta um.

– Fíggjarlógin verður viðgjørd frá oktober til desember, og í hesi tíðini verða altíð ávísar broytingar framdar eftir ynski frá Landsstýrinum eins væl og Løgtinginum. Nýggjar inntøkumetingar fyri komandi ár verða eisini gjørdar hvønn mánað, sigur limurin í fíggjarnevndini.

Fíggjarnevndin fer seinni í vikuni undir at hyggja nærri at uppskotunum, ið hava verið til hoyringar í løgtingsnevndinum. Landsstýrið, peningastovnar, Búskaparráðið og umboð fyri fiskivinnuna verða síðan innkallað at gera sínar metingar um fíggjarlógina. Andstøðan í fíggjarnevndini hevur óivað eisini síni tilmæli, so tað verður nokk at tríva í hjá fíggjarnevndini í komandi dagarnar.

**Fakta**

Íløgur hjá landinum

| | |
|---|---|
| 2004: | 313 mió |
| 2003: | 266 |
| 2002: | 251 |
| 2001: | 186 |
| 2000: | 176 |

*Kelda: Fíggjarlógaruppskotið 2004*